## Úr Løgtinginum



# Aðalorðaskifti um uttanlandsmál

*Høvuðsmálið á tingfundinum í gjár var aðalorðaskifti um uttanlandsmál*

JOHN JOHANNESSEN

Tingfundur var í gjár klokkan tíggu. Hesin tingfundur hevði eitt høvuðsmál á dagsskánni, og var tað aðalorðaskifti um frágreiðing frá løgmanni um uttanlandsmál 1999/2000. Hetta er frágreiðing, ið løgmaður legði fyri tingið 26. januar.

Áðrenn aðalorðaskiftið var atkvøðugreiðsla um fyrispurning nummar 100-20/1999 til Karsten Hansen, landsstýrismann, frá Flemming Mikkelsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi serskatting av hjúnum. Samtykt varð uttan atkvøðugreiðslu, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Framløga var seinast á dagsskránni fyri tingfundin, ið var nummar 45 í ár.



# Veðhaldini flutt

*Samtykt varð í farnu viku at lata Finnboga Arge borga fyri lánum hjá Telefonverki Føroya Løgtings*

JOHN JOHANNESSEN

Fyrsta málið á dagsskránni fyri tingfundin seinasta hósdag var triðja viðgerð av tingmáli nummar 26/1999, ið var uppskot til løgtingslóg um flyting av veðhaldi fyri lánum hjá Telefonverki Føroya Løgtings.

Talan var um at flyta veðhaldini hjá stovninum, ið nú er vorðin privatiseraður, til Finnboga Arge, landsstýrismann.

Uppskotið, sum var samtykt undir aðru viðgerð, varð á fundinum hósdagin endaliga samtykt við 20 atkvøðum fyri, 2 blonkum og 2 ímóti

Trý onnur mál vóru eisini á dagsskránni fyri tingfundin, ið varð settur klokkan hálvgum tvey hósdagin. Talan var um tríggjar fyrstu viðgerðir.

Tann fyrsta av hesum var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 45/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll. Talan er um uppskot, ið Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vegna landsstýrið legði fyri tingið 25. januar. Málið varð beint í fíggjarnevndina.

Næsta fyrsta viðgerðin var av tingmáli nummar 46/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Hetta málið var somuleiðis lagt fyri tingið av Karsteni Hansen, og varð tað eisini beint í fíggjarnevndina.

Seinasta viðgerðin á tingfundinum var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 47/1999, ið er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu. Uppskotið legði Katrin Dahl Jacobsen fyri tingið 25. januar í ár. Málið varð á tingfundinum hósdagin beint í rættarnevndina.

Áðrenn tingfundurin var lokin beint áðrenn klokkan fýra seinnapartin boðaði tingformaðurin frá fyrispurningi frá Flemmingi Mikkelsen, tingmanni, til Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, um serskatting av hjúnum.

# Arbeiðsloysi minkar og meðal útgjaldi veksur

*Seinastu árðini er virksemið í samfelagnum økt munandi, og økta ferðin á búskapinum speglast í hagtølunum hjá arbeiðsloysisskipanini*

Talið á arbeiðsleysum hevur verið støðugt minkandi, tó so, at tað svingar nakað yvir árið. Í 1997 vóru millum 1.700 og 1.100 fólk arbeiðsleys, alt eftir tíðarskeiðinum. Í fjør lá talið millum 1.100 og 700.

Hinvegin er miðal útgjaldið frá ALS til tann arbeiðsleysa økt úr uml. 2.700 til uml. 3.100 kr fyri hvørt 14 daga skeið, ið útgoldi verður fyri. At útgjaldið er økt kemst av, at tann einstaki arbeiðsleysi er stytri inni í skipanini, og tí hevur eitt hægri útrokningsgrundarlag.




### Inn at venda

Gongdin er sostatt tann, at færri eru arbeiðsleys, og tey sum gerast arbeiðsleys, koma so at siga bert inn í skipanina at venda, tí tey finna rættuliga skjótt eitt nýtt starv.

Tí er spurningurin, um tíðin ikki er komin til, at útgjaldsskeiðið verður stytt niður. Ein slík broyting er lættast at fremja, tá tíðirnar eru góðar, og arbeiðsloysi lítið.

Vert er at vísa á, at allar kanningar vísa, at eitt ov langt stuðulsskeið ávirkar evnini hjá tí einstaka at finna fótafestið aftur á arbeiðsmarknaðinum, skrivar Vinnuhúsið.

# ALS kannar arbeiðsmarknaðin

*Arbeiðsloysisskipanin er í gongd við at gera eina kanning av føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað er Fróskaparsetur Føroya, ið skal standa fyri kanningini, skrivar Vinnuhúsið*

Endamálið við kanningini er at fáa eina mynd av støðuni í dag, við atliti til trongar (fløskuhálsar) og møgulig førleikagevandi tiltøk. Somuleiðis er ætlanin at fáa eina mynd av rákinum á arbeiðsmarknaðinum, og við nøktandi grundgevingum vísa á, hvørjir trongar og møguleikar eru fyri framman. Kanningin skal ikki bert geva eina støðumynd, men skal fylgjast upp leypandi.

ALS ger kanningina fyri at styrkja um vitanina, og fyri harvið at kunna ráðgeva betur, umframt at laga førleikagevandi tiltøk til støðuna.

Slíkar kanningar eru ikki gjørdar fyrr, og nú vit standa á markinum til eina møguliga oljuvinnu, har stórar broytingar kunnu henda á arbeiðsmarknaðinum, er ein slík kanning av týdningi fyri samfelagið sum heild, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

# Góðar royndir við skeljaaling

Seinnu árini er nógv gjørt burturúr at menna skeljaalingina til eina nýggja vinnu í Noregi. Í altjóða høpi er vinnan stór við einari árligari framleiðslu uppá 6 milliónir tons. 15% av skeljunum verða fiskaðar, meðan hini 85% eru aldar skeljar

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum, verður sagt, at í Føroyum eru nakrar royndir gjørdar við at ala krækling, men úrslitini eru misjøvn og tað er eingin fyritøka, sum burturav fæst við at ala skjeljar.

Framvið norsku strondini eru góð viðurskifti fyri aling av teimum týdningarmiklastu skeljasløgunum. Aliøkini eru góð, hitin í sjónum er passaligur og ongar sjúkur eru á villum skeljum.

Norðmenn eru í fer við at menna vitanina innan skeljaaling og hava gjørt eina sokallaða skeljaverkætlan. Tað vóru Hordaland fylki, Havforskningsinstituttet og Universiteti í Bergen, sum í 1994 tóku stig til verkætlanina, sum nú er vorðin ein landsfevnandi verkætlan.

Verkætlanin tekur sær av at: samskipa verkætlanir og menna vinnuna, at uppbyggja vitanina í vinnuni, at gera netverk millum vinnuna, granskarar og tað almennu fyrisitingina, at spjaða upplýsingar og at virka sum ígongdsetari o.l.

Tvær ferðir um árið møtast skeljaalarar, granskarar og umsitingin og á skránni er menning av vinnuni. Sera nógv orka verður løgd í at byggja vitanina upp í øllum liðum í virðisketuni. Í løtuni arbeiður Fiskeridirektoratet og Fiskerinæringens Fælles Kompetansestyre við at gera skeið fyri øllum, sum søkja um loyvi at ala skeljar.

# Lestrarkvøld á Bókasavninum í Kollafirði

Til tess at koma meir í samband við lánararnar fer Bókasavnið í Kollafirði nú at hava nøkur fyrilestrarkvøld.

Endamálið hjá einum bókasavnið er umframt at lána bøkur út, eisini at skapa og menna áhugan fyri mentanarlívinum. Tí er ætlanin framyvir regluliga at skipa fyri fyrilestrum, kvøldsetum og øðrum mentanarligum tiltøkum. Sum dømi um hetta kunnu nevnast bókmentakvøld, eitt kvøld um staðarnøvn og okkurt kvøld um fólk í bygdini, ja møguleikarnir eru nógvir. Bókasavnið er í skúlanum, og tí eru góðir møguleikar at hava tiltøk, sum savna nógv fólk.

Ætlanin er at skipa soleiðis fyri, at áhugafeløg eisini hava møguleika at leggja til rættis fundir ella fyrilestrar, sum hava teirra og íbúgvanna áhuga.

Lagt verður fyri við eini fyrilestrarøð um Miðgerð. Miðgerð er kent um alt landið og hevur fostrað mangar kendar føroyingar, og nógv siga seg vera ættað haðani. Feløgini, sum fyrireika hesa fyrilestrarøð eru Kollafjarðar Bygdarsavn og Fornminnafelagið í Kollafirði saman við Felagnum fyri Ættarkanning.

Fyrsti fyrilesturin í ár verður fríggjakvøldið 11. februar kl. 19.00 í skúlanum. Tað verður Ólavur Clementsen, sum skal røða um Miðgerð - eldra part. Ættarkanningarfelagið fer eisini at greiða frá um og vísa við talvum arbeiðið at leita eftir forfedrunum.

Steðgur verður við kaffi og køkum. Ein lítil framsýning av myndum og lutum verður eisini. Og høvi verður eisini at seta fram spurningar.

Tiltakið heldur fram hóskvøldið 9. mars. Ætlanin er at skipa hetta kvøldið sum eina kvøldsetu við tónleiki og frásøgn, har onkur persónur av Miðgerðaættini, ið er fluttur av bygdini, og á onkran hátt hevur gjørt vart við seg, verður umrøddur.

Seinasta tiltakið í hesum umfari verður hóskvøldið 6. apríl. Tá er ætlanin at fáa onkran at taka saman um tey seinastu 100 árini.

Bókasavnið og feløgini vóna, at væl verður tikið undir við hesum tiltøkum.



# Kjaftbandið skal loysast

*Samgongumaðurin Sámal Petur í Grund heldur, at Strandferðslan og heilsuverkið skulu raðfestast hægri enn yvirskotið á fíggjarlógini*

EYÐUN KLAKSTEIN

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum mælir nú til, at fleiri pengar verða játtaðir til Strandferðsluna og heilsuverkið.

– Strandferðslan og heilsuverkið hava tað verri enn likviditeturin hjá landskassanum í løtuni, sigur Sámal Petur í Grund.

Tí mælir hann til, at fleiri pengar verða játtaðir til hesi.

Í heilsuverkinum mangla pengar til rakstur og íløgur. Fólk skulu sigast upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og á hinum báðum sjúkrahúsunum í landinum verður eisini mett, at játtanin er ov lítil.

Trupulleikarnir hjá Strandferðsluni eru væl kendir. Skipini eru ov fá, ov gomul og í ringum standi, og aðra staðni í blaðnum sigur tekniski stjórin á Strandferðsluni, at tað í løtuni er ógjørligt at loysa uppgávuna, sum liggur á stovninum.

Samstundis fær Strandferðslan ikki ta játtan, hon hevur fyri neyðini, og løgtingið hevur sagt korta nei til at hækka ferðaseðlaprísirnar.

Tí heldur tingmaðurin hjá sjálvstýrisflokkinum, at bara ein loysn er á trupulleikanum, og tað er at brúka fleiri pengar av væntaða yvirskotinum hjá landskassanum til neyðugar íløgur og rakstur hjá Strandferðsluni.

– Trupulleikarnir er átrokandi. Vit skulu hava góða samferðslu millum oyggjarnar, men nú er vandi á ferð, tí flotin er niðurslitin. Eg royndi fyri tveimum árum síðani at fáa politikkarnar at skilja støðuna, men tað varð einki gjørt við trupulleikan, og nú er støðan bara enn verri, sigur Sámal Petur í Grund.



*Vit skulu raðfesta Strandferðsluna og heilsuverkið hægri enn eitt yvirskot á fíggjarlógini, sigur Sámal Petur í Grund, formaður í Sjálvstýrisflokkinum*

### Strandferðslan størri týdning

Politikkurin hjá samgonguni er at halda aftur á útreiðslusíðuni og heldur tryggja eitt trivaligt yvirskot á fíggjarlógini. Hetta hevur samband við fullveldispolitikkin hjá samgonguni.

Tað verður mett, at yvirskotið á fíggjarlógini fyri 1999 verður omanfyri 500 milliónir krónur, og fyri ár 2000 verður roknað við einum yvirskoti omanfyri 400 milliónir. Samanlagt eitt yvirskot upp á eina milliard krónur í tvey ár, og tað er landsstýrismaðurin við fíggjarmálum errin av.

Men nú hoyrast aðrir tónar í samgonguni, og avgjørda støðan hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum fær eitt mótspæl frá triðja flokkinum í samgonguni.

– Vit skulu raðfesta Strandferðsluna og heilsuverkið hægri enn eitt yvirskot á fíggjarlógini, sigur Sámal Petur í Grund.

Hann heldur, at tað er bráneyðugt við endurnýggjan av strandferðsluflotanum, og í løtuni er einasta loysnin á trupulleikanum, at fleiri pengar verða latnir Strandferðsluni.

### Bjarni heldur fast

Nýggja frágreiðingin hjá Búskaparráðnum mælir annars frá at økja um almennu útreiðslurnar.

– Ógvuliga stórt trýst er á politikkarunum at játta pening til útreiðslur og íløgur, men her er avgerandi neyðugt, at teir klára at standa ímóti, verður sagt í frágreiðingini.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá Bjarna Olsen, formanni í Búskaparráðnum, í gjár, men tað eydnaðist ikki.

Formaðurin í fíggjarnevndini hjá løgtinginum, Bjarni Djurholm, tekur undir við niðurstøðuni hjá Búskaparráðnum.

– Tað er umráðandi, at vit nú halda fast á útreiðslusíðuni, so vit sleppa undan meirjáttan í ár, sigur fólkafloksmaðurin.

Hann heldur, at tað er tiltrongt, at politikkararnir gera upp við seg sjálvar, hvør ætlanin við Strandferðsluni er.

– Tað er ein spurningur um partar av Strandferðsluni ikki skulu privatiserast. Tað kann loysa trupulleikan, nú Strandferðslan ikki sleppur at virka eftir marknaðartreytum. Tað er ein politisk fadesa, at løgtingið hevur álagt Strandferðsluni at reka ávísar leiðir, sigur Bjarni Djurholm.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

NÓSA CUP 2000

Skála Ítróttarfelag bjóðar øllum gentum og dreingjum til innandurakapping í fótbólti í Ítróttarhøllini á Skála vikuskifti 5. - 6. februar

Aldursbólkar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Unglingar | føddir/ar | 1981-1983 |
| 2. | Dreingir | - | 1984-1985 |
| 3. | Smádreingir | - | 1986-1987 |
| 4. | Piltar | - | 1988-1989 |
| 5. | Smápiltar | - | 1990-1991 |
| 6. | Pinkulingar | - | 1992 og seinni |
| 7. | Gentur 14-17 ár | - | 1983-1985 |
| 8. | Smágentur | - | 1986-1987 |
| 9. | Gentur 10-12 ár | - | 1988-1989 |
| 10. | Pinkur | - | 1990 og seinni |

Á hvørjum liði eru fimm leikarar. Í deildunum gentur 14-17 ár, dreingir og unglingar eru bert fýra leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara.

Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri liðið. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn t.d. Manchester United, FCK, HB.

Eins og undanfarin ár stuðlar FØROYA BANKI kappingini við at lata heiðursmerki til trý tey bestu liðini í hvørjum aldursbólki.

Seinasta freist at boða luttøku er mikudagin 2. februar kl. 20.00, á tel. 441258, 449906, 444584 ella 282574.

SKÁLA ÍTRÓTTARFELAG

Sosialurin - 311820